# ult tamarhald á støðuni

aðist annars um, at tað vóru fólk í flokkinum, sum høvdu teirra egnu meiningar.

– Tað er tekin um, at vit hava ein livandi flokk.

Men løgmaður er eisini sannførdur um, at tað ber væl til at fremja eina samhaldsfasta einskiljing.

– Tað ber væl til, tí ein samhaldsføst einskiljing er ein einskiljing, har peningurin verður brúktur til at gjalda til okkara felags áhugamál við.

**Alment monopol ístaðin fyri privat monopol**

Síðani umrøddi løgmaður einskiljingina av At-lantsflogi.

Atlantsflog er eitt politiskt projekt,tí landsstýrið vildi ikki góðtaka, at vit høvdu eitt privat monopol á økinum og tí vildu vit hava eitt føroyskt flogfelag, sum kundi taka kappingina upp við tað privata monopolið hjá Maersk.

– Men tíverri mistu vit kappingarneytan, Maersk og tað var eitt veldugt afturstig fyri brúkaran. Ìstaðin fyri tað privata monopolið, hava vit nú fingið eitt alment monopol.

Eitt monopol er ongantíð av tí góða og tí er umráðandi at fáa kapping á økinum, Men, sum er nú, fáa vit ongan kapping, tí forðingarnar fyri kapping eru ov nógvar. Eitt nú hava vit eitt tjóðarflogfelag, sum neyvan nakar torir at taka kappingina upp ímóti.

– Men vit hava eisini ein flogvøll, sum forðar øðrum flogfeløgum við øðrum flogførum at brúka, tí hann er ov stuttur. Men tað eru eisini løgfrøðiligar forðingar, sum forða fyri fríari kapping.

– Tí hongur einskiljingin av Atlantsflogi saman við liberaliseringum, sum ger, at Atlantsflog kann flúgva ímillumES- lond og flogfeløg í ES eisini kunnu taka Føroyar við upp í rutunetið. Men tað verður eisini neyðugt at longja flogvøllin, í hvussu so er til 1600 metrar og fáa útbygt terminalin og parkeringsplássini.

Løgmaður vónaði, at gongd fæst á hesa útbygging sum skjótast.

**Fult tamarhald á tilgongdini**

Hann vísti eisini á, at nú Atlantsflog skal einskiljast, skal landið í hvussu so er hava 34% av partabrøvunum eftir.

– Tað, merkir, at landið, í hvussu so er tey næstu sjey árini, kemur at hava ein blokerandi minniluta í Atlantsflogi, so at t‡ðandi avgerðir ikki kunnu takast uttan føroyska góðkenning. Harafturat er ætlanin at gera ein partabrævasáttmála um nøkur grundleggjandi viðurskifti. Eitt, sum hesin sáttmáli kemur at fevna um, er, at Atlantsflog eisini frameftir skal hava høvuðsstøð í Føroyum og at flogruturnar skulu hava útgangsstøðið úr Føroyum.

– Sostatt koma viðurskiftini rundanum Atlantsflog at vera at kalla óbroytt, eftir at tað er einskilt.

– Men vísir tað seg at vit, eftir hesi skey árini, hava fingið nøktandi kapping á økinum og vit annars meta, at landið eigur at taka seg heilt burturúr Atlantsflogi, kann tað lata seg gera at selja tey 34% av partabrøvunum, sum tað almenna skal eiga eftir. Men landið kann eisini varðveita síni partabrøv, um tað verður neyðugt.

Løgmaður vísti á, at talan er sostatt allan vegin um eina tilgongd, sum fult tamarhald er á.

Hann stúrdi heldur ikki fyri Atlantsflogi, tí tað hevði so ótrúliga stóra undirtøku frá Føroya fólki.

– Tað er eisini umráðandi, at privatir íleggjarar fáa høvi at keypa partabrøv í Atlantsflogi, so at góðir møguleikar eru fyri, at meginparturin av partabrøvunum altíð verður verandi á føroyskum hondum.

Løgmaður heldur, at ein einskiljing, kann útvega Atlantsflogi ein samstarvsfelaga, sum kann geva føroyska felagnum enn meiri flúgving, enn tað hevur í dag.

**Mugu seta mark**

Jóannes Eidesgaard segði, annars, at tað hevur stóran týdning, at javnaðarflokkurin setir sær eitt greitt mark fyri, hvat vil góðtaka av einskiljingum.

– Tær fyritøkur, vit nú tosa um at einskilja, eru fyritøkur, sum alla aðrastaðni eru á privatum hondum. Støðan í Føroyum er heilt serlig við tað, at tað almenna eigur so nógvar fyritøkur, at tað eru bara Norðurkorea og Kuba, sum kunnu samanberast við okkum.

Men tað er heiltgreitt, at Javnaðarflokkurin fer ikki at góðtaka, at vælferðartænastur, heilsu-verk, skúlaverk o.a. verður einskilt, men tað er onki í vegin fyri at einskilja handilsligar fyritøkur burturav.

# ímóti føroyska samfelagnum

eisini, at verður Atlantsflog selt, stúrdi hann fyri, at tað verður skjótt, so enda vit aftur í teirri gomlu støðuna, at vit hava bara eina fráferð úr Føroyum um dagin.

Tummas Arabog sipaði eisini til floghavnina í Kastrup, har sjálvt borgarliga stjórnin í Danmark ikki vil selja sín part í floghavnini , tí so týdningarmikið heldur hon tað vera, at danska stjørnin hevur avgerandi ávirkan á hesum partinum í undirstøðukervinum í Danmark.



*Á landsfundi hjá javnaðarflokkinum, ávaraði Tummas Arabo staðiliga ímóti at einskilja Atlantsflog og aðrar fyritøkur, tí tað verður ein hóttan ímóti samfelagnum. Og tað fær hann als ikki at sova betri um næturnar, at landsst‡rið ætlar at seta ymsar treytir við einskiljingini*

**Enda aftur í landskassanum**

Tummas Arabo sigur, at tað eru eisini onkrar royndir gjørdar at einskilja almennar fyritøkur í Føroyum.

– Fyri nøkrum árum síðani skuldi Farmaleiðir hjá Strandferðsluni einskiljast. Tað endaði eisini við, at onkrir lastbilar vórðu seldir. Men tað gekk ikki long tíð, so kastaðu teir privatu frá sær og Strandferðslan mátti keypa lastbilarnar aftur í dýrum dómum.

Somuleiðis skuldi Siglingin út í Mykines einskiljast, men eisini hon endaði aftur hjá tí almenna. Og feskasta dømi er kunningardiskurin á Flogvøllinum, sum eisini er endaður aftur hjá tí almenna.

– Tað vísir seg, at einskiljingar aloftast botna í onkrari øvundsjúku eftir at yvirtaka tað almenna virksemið, sum tey halda gongur væl, men mangan vísir tað seg, at tey privatu kasta frá sær aftur, tá ið ein tíð er fráliðin og tað vísir seg ikki at ganga eftir ætlan og so hongur tað almenna aftur upp á tað.

**Hava slept endanum**

Tummas Arabo helt, at tað tað tykist um um at politiski mynduleikin púra hevur slept endanum tá ið umræður fiski- og aliloyvi.

– Hettar er átaluvert, og tí heitir Norðstrymoyar Javnaðarfelag á tey fólkavaldu umboðini hjá javnaðarflokkinum um at gera sína skyldu og fáa tamarhald á hesum viðurskiftum, soleiðis at fiskimálaráðið og vinnumálastýrið ikki verða tey beri gummistempul á tað sum peningastovnar og privatpersónar blíva samdir um.

– Ónýtt loyvir eiga at verða tikin inn og bjóðaði út av nýggjum. Alt annað er átaluvert, staðfestir Norðstreymoyar Javnaðarfelag.

Javnaðarfólk í Norðstreymoy eru eisini ørkymlað av, at milliónfyritøkur sum landið og sostatt alt fólkið eigur, verða seldar uttan at tey, vit hava valt at umsita hesi virði hava nakra ávirkan.

– Føroya størsta fiskivinnufyritøka verður seld fyrsta dagin. Harmuligt verður tað, um alt sølunetið og umdømið hjá okkara framleiðarum endar í einari útlendskari stórfyritøku á sama hátt sum virksemið hjá Faroe Seafood í Grimsby á sinni, sigur Tummas Arabo.

**Onki álit á treytunum**

Men nú ætlanin at einskilja almennar fyritøkur, er eisini ætlanin at seta ymsar treytir við. Eitt nú skulu bara 66% av Atlantsflogi seljast fyri at føroyingar framvegis kunnu hava veto-rætt í felagnum, so at onki kann gerast uttan at føroyingar eisini góðtaka tað.

Men tað fær als ikki Tummas Arabo at sova betri um næturnar.

– Eg kenni alt til slíkar treytir. Tað hendi akkurát tað sama við Føroyagrunninum og fiskivinnulógunum. Har skuldu eisini allar møguligar treytir ogavmarkingar vera við fyri at forða fyri, at nakað hendi, sum ikki hóvaði politiska myndugleikanum. Men allar hesar treytir og allar hesar avmarkingar hevur - serliga fólkaflokkurin -, so líðandi fingið linkaðar ímeðan øll hini hava sitið og sovið í tinginum, so áðrenn vit vita av, vakna vit við kaldan dreym og so eru ongar treytir og ongar avmarkingar longur.

Hann nevnir sum eitt dømi, at tað var ongantíð ætlanin, at reiðarar skuldu fáa ognarrætin til fiskiloyvini, so at teir kundu selja tað við stórum vinningi, sum teir høvdu fingið frá landinum fyri onki, soleiðis sum vit síggja nógv dømi um nú.

– Tað eru nýggjar regl-ar, sum fólkaflokkurin spakiliga hevur smoygt inn í umsitingina av lógini, uttan at nakar hevur uppdagað nakað, fyrrenn ov seint var.

Tummas Arabo er púra sannførdur um, at akkurát tað sama fer at gera seg galdandi við Atlantsflogi og øðrum fyritøkum, sum ætlanin er at selja undir ávísum treytum.